**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Korallir. Túrur nr. 1826**
**Tíðarskeið: 6-13/6-2018**

---

**Fólk frá HAV:** Mourits Mohr Joensen, Poul Vestergaard og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, kanningarleiðari.

**Endamál:** Hetta var annar túrur í samband við eina norðurlendska verkætlan, sum nevnist NovasArc. Endamálið við verkætlanini er at skráseta útbreiðslu av korallum og øðrum viðbreknum verum í norður-eystur Atlantshavi.

**Reiðskapur:** Ein serstøk videoútgerð, har videoupptøkur verða skrásettar, meðan tær eisini verða vístar á skipinum. Talan er um útgerð, sum Havstovan eigur og aðra útgerð, sum er keypt til endamálið. Í mun til í fjør bar í ár til at fara djúpari enn umleið 400 m. Vinkulin á kamerainum var víðari í ár í mun til í fjør.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hósdagin 7/6 kl. 17:30. Tóku eina royndarstøð suður úr Nólsoy og fóru síðan suður á Munkagrunnin. Har høvdu vit trupulleikar við útgerðini og fóru á Havnina at umvæla hana. Fóru síðan suður á Munkagrunnin og tóku støðir. Eftir tað fóru vit á Føroyabanka og tóku støðir suður-vestureftir og sunnanvert Bill Baileybanka. Vit tóku støðir vestan- og norðan fyri Bill Baileybanka og tóku støðir í norðara parti av Føroyabanka. Tóku eina støð í Bankarennuni og síðan inneftir á føroyska landgrunninum vestanfyri. Fóru og settu fólk av í Tórshavn týsmorgunin 12/6 og tóku síðan støðir millum Sandoyarbanka og Suðuroyarbanka. Vóru á Havnini mikumorgunin kl. 7.

**Fyribilsúrslit:** Videoútgerðin var tann sama, sum í fjør (Mynd 1). Í ár varð videosignalið sent ígjøgnum CTD-kaðalin (heldur enn gjøgnum ein videokaðal) og tí vóru myndirnar á sjónvarpinum ikki líka klárar, sum í fjør. Tí var eitt sindur verri at halda upptøkuútgerðini nær botni. Hinvegin var møguligt at taka upptøkur á djúpari vatni enn í fjør. Eins og í fjør høvdu vit eitt annað kamera niðri á botni, sum goymdi upptøkurnar. Vit tóku tilsamans 63 góðkendar støðir, sum vardu 30 minuttir hvør (Mynd 2). Vit sóu korallir á í minsta lagi trimum støðum, suður av Bill Baileybanka, suður av Føroyabanka og suður av Sandoyarbanka. Tað var ostur at síggja á mongum av teimum djúpu støðunum. Vit sóu eisini fisk av ymsum slagi og annars nógv áhugavert, sí Mynd 3 til 8. Vit sóu onkra gamla línu á botni, men einki húsarhaldsburturkast.

**Nær eru upptøkurnar lisnar inn á teldu:**
Upptøkurnar vórðu goymdar á harddiski so hvørt, sum støðirnar vórðu tiknar.



Mynd 1. Útgerð brúkt til videokanning av korallum undir Føroyum í juni 2018. Til eina jarnstong eru fest tvey ljós og tvey kamera, umframt ein stýrifjøður og tvey lodd.




Mynd 2. Videokanning av korallum undir Føroyum í juni 2018. 100-600 m dýpdarkurvar eru vístar, umframt 12 fjórðinga fiskimarkið. Svartir trýkantar vísa tær 63 góðkendu støðirnar í 2018 og til samanberingar eru reyðir fýrakantar, sum vísa tær 53 góðkendu støðirnar í 2017. Ikki var væntað at finna korallir í økinum norðan- og eystan fyri Føroyar og tí vóru støðir ikki tiknar har.



Mynd 3. Deyðar korallir (*Lophelia*) við sjótrøum (*Paragorgia*) á støð 18260059, sum var suður av Sandoyarbanka. Eisini síggjast sjónotur og ein krossfiskur.



Mynd 4. Svampar (*Phakellia*) og ein flatfiskur á støð 18260063, sum var norður av Suðuroyarbanka. Eisini sæst krill til vinstru á myndini.



Mynd 5. Hýsa og flatfiskur á Føroyabanka á støð 18260023.



Mynd 6. Fiskur savnast, har korallir eru. Frá støð 18260025, sum var suður av Føroyabanka.



Mynd 7. Ein reyður sjófjøður. Frá støð 18260035, sum var suður av Bill Baileybanka.



Mynd 8. Skøta í tí ísakalda sjónum norðanvert í Føroyabankarennuni á 865 m dýpi. Frá støð 18260050.

Á Havstovuni 18. juni 2018
Petur Steingrund